## HEILSANIR



**Góði Tórður!**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Heilsan Niels**



**Góða, fitta Maibrit**
Hjartaliga tillukku við tínum allar fyrsta føðingardegi. Gleði meg at koma í føðingardag í morgin.
**Heilsan Ronja**



**Góði abbi, S. abbi og langabbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 15. juni. Alt tað besta verður ynskt tær. Takk fyri alt, ið tú hevur og er fyri okkum øll. Bestu ynski frá **Ditlev, Sólrun og Teitur**



**Góðu tit bæði!**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum tann 11. juni.
**Heilsan Sjúrður og Gunnar**

**Góði Magnus**
Lukku og gleði á tínum 3 ára degi 12. juni.
**Heilsan omma og abbi í Streymnesi**



**Hans Olaf Andersen, Lopra**
Góði tú, vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 70 ára degnum, sum verður 15 juni. Øll tey bestu ynski í framtíðini ynskja **okur 3 í Vági**
P.S. Góðan túr við Norrønu.





**Góði, elskaði Kristian**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 10. juni. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan mamma, babba og Dávid**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Her er tú fitt.
**Heilsan vit tríggir**



**Góðu Eyðbritt og Hans Jacob**
Hjartaliga tillukku við 10 og 2 ára føðingardøgunum. Jesus pápin signi tykkum.
**Heilsan omman og abbin**

# Konsert á Høganesi

Leygarkvøldið 11. juni kl. 20.00, verður forkunnug konsert umborð á Høganesi í Runavík, har Tóri R. Jacobsen, cello og Angelika Nielsen, violin, framføra verk eftir Z. Kodàly og Handel/Halvorsen. Tóri og Angelika hava lisið tónleik saman í Reykjavík, og hava eisini síðan spælt nógv saman.

Zoltan Kodály (1882-1967) hevði stóran áhuga í ungverskari mentan og traditiónum. Í byrjanini av 20. øld ferðaist Kodàly saman við Bela Bartok í Ungarn og samlaði saman fólkaløg, ið vóru givin út seinni. Hetta vakti stóran ans víða um. Eisini duettin fyri violin og cello Op. 7, ið er skrivað í Budapest í 1914, er merkt av áhuga hansara fyri fólkatónleiki.

Johan Halvorsen (1884-1935) var ein norskur tónasmiðjur, tónleikari og dirigentur. Hann spældi sjálvur violin. Verk hansara eru sprottin úr tí romantiska stílinum hjá Grieg og Svendsen. Passacaglia fyri violin og cello, varð upprunaliga skrivað fyri violin og viola. Passacaglia er ein formur í barok tónlist, har bassgongdin í høvuðsheitum endurtekur seg. Passacaglia formurin er upprunaliga komin úr einum sponskum dansi.

Aftaná konsertina verður hugnaløta við kaffi og køkum. Kostnaður kr. 50,-



**Góða diddan!**
Tillukku við degnum. Hetta vóru dagar.
**Heilsan vit gomlu**

**Góða systkinabarnið Eva**
Lukku og gleði á tínum 5 ára degi. Nú er tú ein stór genta. Eisini fær mamma eina heilsan í sambandi við at hon nú er blivin sjúkrarøktarfrøðingur.
**Kærar heilsanir Filip, Levi og Jóhannes**

